## Rambøll til Noregs

Danska verkfrøðingafelagið Rambøll Olie & Gas, ið, sum navnið sigur, virkar innan oljuvinnuna, ætlar sær nú av álvara at fáa fótafesti á norska marknaðinum. Í hesum sambandi hevur felagið skrivað undir ein samstarvssáttmála við norsku fyritøkuna Bergen Group Rosenberg. John Sørensen, stjóri í Rambøll, sigur, at samanlagt hava fyritøkurnar næstan 1.000 verkfrøðingar og kunnu tí bjóða frálandavinnuni egnar heildarloysnir.



## Sjáldsamur hvalur

Fleiri vísindafólk eru á veg til Alaska, eftir at menn hava sæð ein hvítan bóghvítuhval nærhendis landi har. Hvítir bóghvítuhvalir eru sjáldsamir, men tey, sum hava sæð hvalin, eru á einum máli um, at talan er um ein hvítan bóghvítuhval, sigur CNN. Hvíti bóghvítuhvalurin á hesari myndini varð avmyndaður nærhendis Aleutian-oyggjunum fyri nøkrum árum síðani, men hann sást ongantíð aftur. Hann varð mettur at vera 10 metrar langur.

*Hvítur bóghvítuhvalur er sjáldsamur (Mynd: Vísir)*

# Lønarviðurskiftini hjá ambulansufólki út av lagi vánalig

**– Eg haldi ikki, at okkara fólk í nóg stóran mun verða vird fyri tað, tey gera og tær uppgávur, sum lagdar eru á okkum. Hesi fimm árini, eg havi verið í hesum starvi, eru nógvar broytingar farnar fram, og stór ábyrgd er løgd á okkum við viðgerð á staðnum og í sjúkrabili eins og við heilivági. Haraftrat skulu frágreiðingar skrivast um hvørja einstaka ferð og hvønn einstakan sjúkling, sigur Asbjørn Knudsen, ið er talsmaður fyri fólk í sjúkraflutningstænastuni**

SJÚKRAFLUTNINGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Visti tú, at tey, sum koyra sjúkrabil, bert tjena 103 krónur um tíman í vanligari arbeiðstíð frá 08-16 – og at tímalønin, sum viðkomandi fáa, meðan hann ella hon hava tilkallivakt frá 16-08, bert er góðar 26 krónur? Og visti tú, at fasta lønin hjá einum fólki, sum hevur havt sítt dagliga yrki í einum sjúkrabili í fimm ár, bert er góðar 18.000 krónur um mánaðin – fyri 80 tímar effektiva tíð og 256 tímar á tilkallivakt um mánaðin?

Hetta ljóðar ikki av tí heilt stóra í mun til ábyrgdina og førleikan, sum liggur aftanfyri eitt slíkt starv.

Í Eysturoy eru tvey lið av fólki, sum syrgja fyri sjúkraflutningi í økinum. Hesi arbeiða undir Sjúkraflutningstænastuni hjá Landssjúkrahúsinum, og tað gera tey, sum koyra í Vágunum, eisini.

Tvey fólk eru á hvørjum liði, og tey eru knýtt at tænastuni í eina viku í senn – frá mikumorgni klokkan 08 til næsta mikumorgun klokkan 08. Vanliga arbeiðstíðin er frá klokkan 08 á morgni til klokkan 16 seinnapart. Frá mánadegi til fríggjadag hava tey støð á Lambareiði, har Sjúkraflutningstænastan hevur bilarnar standandi og hølir til starvsfólkið.

Eftir klokkan 16 og í vikuskiftinum hava ambulansufólkini tilkallivakt heima við hús alt samdøgnið, og tá hava tey bilarnar standandi í túninum. Tey, sum eru á vakt, eru soleiðis knýtt at tænastuni í 24 tímar um døgnið – í eina heila viku í senn. Skulu tey út um hurðina, noyðast tey at hava telefon, bippara og sjúkrabil hjá sær.

Samlaða tímatalið, har tey, sum eru á vakt, eru knýtt at tænastuni í einum mánaða, er soleiðis 336 – og fyri hetta tilknýti til tænastuna tjena hesi fólkini eftir umleið 5 árum stívliga 18.000 krónur um mánaðin.

Tá ið vaktarskiftið er mikumorgun, hevur liðið, sum byrjaði mikumorgunin fyri, frí í eina viku.

### Vánalig lønarkor

Fólk, sum koyra fyri sjúkrahúsini, eru sum heild væl nøgd við arbeiðsumstøðurnar og samanhaldið millum tey, sum eru í starvi hjá tænastuni. Men tey halda kortini ikki, at lønarlagið er nakað at rópa hurrá fyri.

Asbjørn Knudsen er talsmaður hjá teimum, sum søgdu limaskapin upp í Havnar Arbeiðsmannafelag og fóru upp í Starvsmannafelagið.

Hann sigur, at tað er eitt sindur ymiskt, hvussu vaktirnar eru skipaðar í Eysturoy og á hinum støðunum kring landið, men soleiðis, sum vit her hava greitt frá, eru vaktirnar skipaðar hjá teimum báðum liðunum, sum um Sjúkraflutningstænastuna hjá Landssjúkrahúsinum hava støð á Lambareiði.

- Eg havi verið í starvi í fimm ár, og makkarin hjá mær hevur verið í eini tvey ár longri enn eg. Eg haldi, at fasta lønin hjá honum er einar 1000 krónur hægri enn mín løn er, sum liggur um 18.100 krónur um mánaðin.

Asbjørn heldur, at lønin hækkar eitt vet, til tú hevur verið í starvi í eini 12 ár,





*- Hvussu skal tað vera, tá ið ein av limunum í fasta gerðarrættinum er Vígdis Johannesen, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Tað undrar meg, at hon ikki heldur seg vera ógegniðan í slíkum máli, sum snýr seg um eitt annað arbeiðarafelag, sigur Asbjørn Knudsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*